# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*e-postur: anna@sosialurin.fo*

## Flekk fyllir 25 ár

Væl umtókti hundahvølpurin Flekk fyllir 25 ár, og í hesum sambandi hevur Bókadeildin givið út tríggjar nýggjar bøkur um Flekk og vinir hansara.

Fyrsta Flekk bókin kom út í 1980, og tað vísti seg skjótt, at enski teknarin Eric Hill, hevði rakt okkurt, sum børnum hava dámað. Uttan iva, tí við Flekk bókunum skulu børnini ikki sita í friði og lurta, men heldur spæla við bókina.

*Flekk á bóndagarðinum* er ein bók, sum er grundað á kenslusansin. Í bókini hjálpir Flekk til á bóndagarðinum, og børnini kunnu nerta við myndirnar og fáa eina kenslu av m.a bleytum høsnarungum, ullintum seyði, snýðinum á grísinum ella rusputum hoyggi.

Bókin er prentað á hart papp og er egnað til tey smæstu børnini.



*Flekk stuttleikar sær* og *Flekk spælir* eru tvær málibøkur, egnaðar til størri børn. Í bókunum eru 48 sera stuttligar myndir av Flekki, familju og vinum hansara og undir myndunum er ein lítil frágreiðing um, hvat tey takast við. Vaksin kunnu lesa fyri børnunum ella børnini, sum júst eru byrjað ella hava nakrar royndir at lesa, kunnu sjálvi lesa tað, sum stendur undir myndini.

Litbøkurnar eru í A4 stødd, so myndirnar eru stórar og lættar at lita. Við bókunum fylgir oljukrit, so børnini kunnu byrja at lita beinanvegin.

Nýggju Flekk bøkurnar fáast um alt landið.



# Eg og bøkurnar



*Jákup Magnussen kundi hugsað sær at granska* ***Koranina*** *og* ***Gamla Testamentið*** *fyri at vita, hví átrúnaðarliga stríðið heldur fram*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Jákup Magnussen, útvarpsvertur**

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
- *Vinden Er min Moder* eftir indianaran Bear Heart. Bear Heart er medisinmaður, sum eisini hevur lisið vesturlendska sálarfrøði og heimspeki. Eg lesi bókina, tí í løtuni hava teir universellu spurningarnir mín stóra áhuga. Ikki vænti eg at fáa endalig svar, men ábendingar og vegleiðingar kann eg saktans brúka. Bókin er fyrst og fremst ein innføring í at liva eitt gott lív; bæði verðsliga og andaliga. Stutt sagt er tað kærleiki til alt, sum livir og andar. Hann nemur við nógv, sum vit innast inni eru greið yvir, men ikki megna at liva eftir, tí vit eru so gramm, egoistisk, og maktsjúk. Hann sóknast eftir okkara takksemi og áliti á Gud.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
- Eg las *7 Ár í Tibet* fyri eini 10-15 árum síðan. Tað er tann besta ferðafrásøgnin, eg nakrantíð havi lisið. Talan er um eina ótrúliga ferð hjá eysturríkaranum Heinrich Harrer. Við krígsbyrjan var hann staddur í India. Men bretska valdið á staðnum vildi hava fatur í honum, tí hann var týsktmæltur. So, hann gjørdi ikki mætari enn at leggja til beins upp í Himmalaya. Tað tók honum fleiri ár at koma leiðina fram til tibetanska høvuðsstaðin, Lhasa. Bókin bjóðar nógv drama, og Heinrich Harrer nýtir nógv snildni fyri at gjøgnumføra ferðina. Bæði fjallaløgreglan, brotsmenn og aðrir royndu at gera honum lívið svárt, men tað gekk kortini. Hann gjørdist lærumeistari hjá smádronginum Dalai Lama, og teir nærum fylgdust úr Tibet, tá Kina hersetti landið. *7 Ár i Tibet* er ein lýsing av, hvussu menniskju eru og hvussu nógv, vit í veruleikanum eru før fyri, tá á stendur. Men hon snýr seg eisini um kærleika. T.d. sýndu tibetanaranir stóran kærleika til Móður Jørð og tað, sum av henni livir.

*Hvør var fyrsta bókin tú las?*
- Tjaa ... *Robin Hood* var í hvussu so er ein tann fyrsta, sum eg las sjálvur. Robin Hood gjørdi uppreistur móti tí valdssjúku yvirvøldini. Tað var seint í miðøld, tá bæði kongur og kirkjan gingu saman um at halda fólkinum niðri fyri einhvønn prís. Hood vísti eisini á næstrakærleikan, sum enn tann dag í dag hevur trong kor í hesum parti av heiminum. Men í *Robin Hood* var eisini vakur kærleiki millum mann og kvinnu - og tað dámdi mær væl ...

*Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*
- Tá eg verið 70, havi eg nokk granskað *Koranina* og *Gamla Testamentið* væl og virðiliga. Nú nevni eg tvær bøkur, tí hesar báðar eru nær knýttar. Nógv stríð í heiminum kemst av, at summi liva eftir *Koranini*, meðan onnur liva eftir *Gamla Testamenti*. Sjálvandi er tað bara ein partur av sannleikanum, men lat tað hvíla hesuferð. Bæði jødarnir og arabarnir hava jú Abraham sum "abba". Teir hava í nógvar øldir livað lið um lið í Miðeystri, so hesar báðar bøkurnar eru sera áhugaverdar sum eitt samlað studium.

*Hondina á hjarta - lesur tú altíð eina bók lidna?*
- Nei, so avgjørt ikki. Mín tíð er dýrabar, so eg lesi bara bøkur, sum siga mær nakað. Tá fyrsti partur av bókini er lisin, taki eg støðu til, um eg skal halda fram, ella velja eina aðra. Í onkrum føri hevur tað eisini nakað við høvundin at gera. Summi fólk duga betur at siga søgur enn onnur. Soleiðis er tað bara. Vit gera royndir alt lívið. Annars kunnu vit ikki mennast.

Fráboðan:

## Innsavning av ritgerðum

Landsbókasavnið boðar frá, at tey við gleði taka ímóti ritgerðum, ið føroysk lesandi skriva undir hægri lestri. Lesandi, kandidatar o.tl., sum senda Landsbókasavninum handrit, antin til ognar ella at avrita, verða biðin um at fylla eitt oyðublað út, og senda tað saman við ritgerðini. Oyðublaðið liggur klárt at takað niður á heimasíðuni hjá Landsbókasavninum, www.flb.fo ella fæst við at venda sær til Landsbókasavnið.

## Tak bókina við í fjøruna

Nú summarið er komið, og tíð er at vera úti í nátttúruni, hevur Føroya Skúlabókagrunnur givið út bókina *Dýr og plantur í fjøruni*.

Bókin egnar seg væl at hava við oman í fjøruna, tí síðurnar eru plastviðgjørdar, so tær tola meir enn vanligt pappír, og støddin ger, at hon er løtt at hava hjá sær. Góðar litmyndir og tekningar av plantum, tara, fiski, krabbadýrum, skeljadýrum og øðrum botndýrum, so væl skuldi borið til at funnið navnið á tí, sum livir í fjøruni.

Sólgerð Andreassen hevur týtt og lagað til føroysk viðurskifti úr norskum. Pól Jespersen, Astrid Andreasen og Sólgerð Andreassen eiga føroysku myndirnar og tekningarnar. Magnus Gaard og Jan Sørensen, lívfrøðingar, hava fakliga viðgjørt handritið.

Í skúlanum er *Dýr og platur í fjøruni* hent handbók at hava, tá farið verður út at kanna fjøruna. Bókin er ætlað fólkaskúlanum, men kann nýtast av øllum, ið hava áhuga fyri lívinum í fjøruni.

Bókin er 59 blaðsíður, og tað er Føroyaprent, sum hevur havt prentumsitingina um hendi

*Dýr og plantur í fjøruni*,
Føroya Skúlabókagrunnur, 2005



**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar...**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo